## Húsaófriður og hasj

**Vikuskiftið hevur sum heild verið friðarligt á løgreglustøðini í Havn. Fríggjadagin kom ein portugisiskur trolari at bryggju og har funnu tollarar hasj**

LØGREGLUTÍÐINDI
*dagfinn@sosialurin.fo*

Tá tollarar við hundum fóru umborð á portugisiska trolaran, funnu teir umleið 4 gram av hasji. Maðurin, ið átti, fekk eina bót og varð vístur av landinum. Hann fór avstað aftur við trolaranum, men fekk strong boð um ikki at vísa seg aftur fyribils. Júst hvussu longi veit løgreglan ikki enn, tí tað eru hægri myndugleikar, ið taka ta avgerðina.

Leygardagin, var ein bilførari tikin fyri t koyra ávirkaður av rúsdrekka.

Nakað av húsaófriði hevur eisini verið um vikuskiftið, men sum heild metir løgreglan, at talan hevur verið um eitt friðarligt vikuskifti.

# Býarmenning í Havn fer fram í Reykjavík

**Vælumtóktu framsýningarnar hjá Føroya Landsskjalasavni og Tórshavnar Býarsavni um 'Býarmenning í Havn' fara til Reykjavíkar, har tær skulu sýnast fram. Tað er Borgarskjalasafn Reykjavíkur sum skipar fyri**

FRAMSÝNING
*tíðindaskriv*




*Soleiðis sá býarætlanin út fyri Havnina seinast í 1800-talinum*

Tvey tey seinastu árini hava Føroya Landsskjalasavn og Tórshavnar Býarsavn havt framsýningar í Smiðjuni í Lítluvík um Býarmenningina í Havn. Hesar framsýningar hava verið væl umtøktar millum fólk í Føroyum. Nú hava íslendingar eisini víst hesum framsýningum áhuga.

Tað er Borgarskjalasafn Reykjavíkur sum hevur biðið um at fáa framsýningarnar til Íslands, har tær verða settar upp í hølum Borgarskjalasavnsins. Framsýningin letur upp leygardagin 3. december. Borgarstjórin í Reykjavík letur framsýningina upp, saman við umboði frá Føroya Landsskjalasavni. Borgarskjalasavnið hevur bjóðað eini 700 fólkum til upplatingina. Framsýningin verður opin fram til 12. februar 2006.

Evnið í framsýningunum er býarmenningin í tíðarskeiðinum frá 1856, tá ið Thorshavns Bygningskommission, bygginevndin, fór at virka, og fram til 2005.

Longu miðskeiðis í 1860-árunum kom tann fyrsta byggiætlanin fyri gamla býarpartin í Tórshavn. Umleið 1880 sæst, at ein skipað bygging fer fram uttan fyri gamla býarpartin. Tinghúsvegurin fekk skap og somuleiðis bylingurin í Bø - t.e. Bø-, Tróndar- og Magnus Heinasonar gøta.

Fyrst í 20. øld tók Havnin at vaksa. Útstykkingar vórðu gjørdar, og bylingurin í Abbatrøð og høvuðsgøturnar niðan til Rabarbukvarterið gjørdust veruleiki. Seinast í 1940-árunum fluttu fólk í stórum tali til Tórshavnar, og bylingarnir í Hornabø og Grønland sóu dagsins ljós. Tað var eisini um hetta mundið Føroya Løgting fór at viðgera lógina um býarskipanir og byggisamtyktir. Fyri Havnina var tað í tøkum tíma og arbeiðið byrjaði alt fyri eitt, men varð fyrst liðugt í 1972, tá ið almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu fekk gildi.

Framsýningin er eisini um, hvussu býurin á ymsan hátt vaks í 1950-árunum og hvussu byggivinnan veruliga tók dik á seg í 1960-árunum. Somuleiðis er við 1970-árunum, tá ið bæði kommunalar og privatar útstykkingar vórðu ætlaðar, meðan størri - og mangan øðrvísi bygging - tvíhús og randarhús o.a. sóust í 1980-árunum og fram til búskaparkreppuna fyrst í 1990-árunum.

Júst í hesum døgum fer tann størsta kommunala útstykkingin fram - Hoyvíkshagi Suður, og fyrstu húsini verða reist haruppi nú. Sigast skal, at sama útstykking er tann fyrsta, ið kommunan er farin í holt við síðani kreppuárið 1992.

Av tí at Tórshavnar kommuna seinastu árini er vaksin við oyggjum og grannabygdum, hevur tað verið neyðugt við eini heildarætlan. Tí hava søvnini sjálvsagt givið byggi- og býarskipanardeild Tórshavnar kommunu innivist á framsýningini. Her verður at síggja, hvussu politikarar og embætisfólk í felag royna at lúka tørvin í framtíðini hjá teirri vaksandi fjøld av fólki, ið fer at seta búgv í kommununi.

Ætlanin við framsýningini er at fáa fram, hvussu Havnin av álvara tók at vaksa miðskeiðis í 20. øld og fram í dag.

Á framsýningini eru myndir, kort, tekningar, skjøl og tøl, sum vísa, hvussu býurin hevur flutt seg og hvussu fólk í Tórshavn hava hugsað, tá ið tey hava søkt um byggiloyvi til sethús og umbyggingar. Á framsýningini eru eisini umsóknir frá handlum og fyritøkum og almennum stovnum.

STARVSLÝSING

## Goymslufólk

Søkt verður eftir dugnaligum og álítandi goymslufólki til maskinmiðstøðina í Kollafirði. Maskinmiðstøðin hevur um hendi viðlíkahald av entreprenørmaskinum hjá Landsverki og høvuðsgoymslu av eykalutum og amboðum, herundir innkeyp og viðlíkahald av hesum.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir um útflýggjan av maskinlutum / amboðum, umframt viðlíkahald og stýring av goymslu og amboðsrúmi á maskinmiðstøðini.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari við kunnleika til entreprenørmaskinur og lasbilar hevur fyrimun, tó er tað eingin treyt. Harumframt krevst góður teldukunnleiki. Umsøkjarin skal hava vanligt koyrikort

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært avvarðandi yrkissáttmála ella sambært avtalu.

**Umsóknir**
Umsóknir vera at senda til:

Landsverk
Postsmoga 78
110 Tórshavn

og skulu vera skrivstovuni í hendi seinasta lagi 16. des. 2005. Merkið brævbjálvan "Umsókn goymslufólk". Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Rógva Nielsen, goymsluleiðara, á tlf. 422 420 ella 540 958

www.samsk.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn,
Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo
LANDSVERK byggir land

## 1000 Navnabøkur seldar

BØKUR
*tíðindaskriv*

Nýggja NAVNABÓKIN kom út 28. oktober - og henda mánaðin síðan eru seld um 1000 eintøk. Bókin lá ovast á sølulistanum hjá Bókasøluni tvær tær fyrstu vikurnar, mátti so lúta fyri GLANSBÍLÆTASAMLARUNUM hjá Jóanesi Nielsen, men farnu vikuna, viku 47 - frá 21. til 27. november - gjørdist NAVNABÓKIN aftur nr. 1.

Forlagið hevur ikki ætlanir um at prenta bókina uppaftur, so tey, ið vilja ogna sær hana, mugu bera skjótt at. Nøkur hundrað eintøk eru eftir á goymslu, sigur Forlagið Fannir í tíðindaskrivi.

## Tað besta frá Jens Lisberg

**Tann 1. desember kom dupultfløga við tí besta, ið Jens Lisberg hevur givið út**

TÓNLEIKUR
*dagfinn@sosialurin.fo*

Á dupultfløguni eru løg, sum Jens Lisberg hevur sungið seinastu 30 árini, ella so, og er talan um savn frá útgávunum, sum komu í 80'unum og 90'unum. Hetta er somuleiðis fyrstuferð, at løg hjá Jens Lisberg fáast á fløgu, tí fyrr hevur fólkakæri sangarin bert givið út á bandi.

Tutl stendur fyri útgávuni.